## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og fyrst regn av og á, men út á seinnapartin turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og mánadagin yvirhøvur turt, men týsdagin møguliga regn av og á. Hitin millum 7 og 11 stig.

GHM og Rútmiska Kórið á cafékonert í Eysturskúlanum:

# Frálíkt

*Orð og myndir*

*Jan Müller*

Ein heldur óvanlig konsert í Eysturskúlanum herfyri boðar frá eini gróðrarmiklari tíð fyri bæði kór og orkestur í høvuðsstaðnum. Umleið 60 ung og tilkomin høvdu sett foreldrum, systkjum, vinum og kenningum stevnu í rúmligu aulini í Eysturskúlanum nakað herfyri. Undir sera hugnaligum og óformellum umstøðum, har borðreitt varð við kaffi og køkum, ljómaði sjongurin frá Rútmiska kórinum í Hoydølum undir leiðslu av Hans Olivur Joensen. Frægir og góðir sangir við fylgispæli av Hans Larsen, sanglærara. Kórið mannað av ungum kvinnum og monnum, næmingar, sum ganga í Hoydølum í dag og sum hava gingið í Hoydølum. Umframt kórið settu so umleið 40 ungir træ- og messingblásarar hjá GHM sín dám á hugnaløtuna. Við eini sera fjølbroyttari og vælvaldari skrá stjórnaði Andrea Heindriksdóttur hesum ljómandi og livandi orkestrinum. Frálíkt tiltak, frálíkt spæl og sangur vóru orðini hjá fleiri av fegnu áhoyrarunum aftaná. Konsertin ber boð um, at lív er aftur í træ- og messingblástrinum. Frálíka arbeiðið hjá Musikkskúlanum ber ávøkstur. GHM, sum hevur havt tungt við at seta ung við, fær nú ágóðan av hesum arbeiði, og orkestrið er í besta blóma. Tað grør um gangandi fót innan tónlistina er niðurstøðan eftir hesa konsertina. Frálíkt.



*Tey ungu streyma til GHM, nú træ- og messingblástur aftur er vorðin »in«*



*Rútmiska Kórið í Hoydølum setti sín dám á*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷6 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 7 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | – |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 12 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 27 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 34 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 985 hPa vestan fyri Ísland grynnist og brúgvalagið haðani til Føroya fer í útnyrðing.




Eitt lágtrýst, 970 hPa vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/11 kl. 06[00]– 21/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 21/10 kl. 06[00]– 20/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 135,4 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

16. nov.: Mánin longst frá jørðini
20. nov.: Fullmáni
27. nov.: Seinna kvarter
2. des.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. nov | 07.56 | 20.20 | 06.56 | 19.20 | 07.11 | 19.35 | 09.56 | 22.20 | 10.56 | 23.20 | 06.11 | 18.35 | 05.11 | 17.35 | 08.11 | 20.35 | 09.11 | 21.35 | 07.41 | 20.05 | 08.56 | 21.20 |
| 23. nov | 08.44 | 21.08 | 07.44 | 20.08 | 07.59 | 20.23 | 10.44 | 23.08 | 11.44 | — | 06.59 | 19.23 | 05.59 | 18.23 | 08.59 | 21.23 | 09.59 | 22.23 | 08.29 | 20.53 | 09.44 | 22.08 |
| 24. nov | 09.33 | 21.58 | 08.33 | 20.58 | 08.48 | 21.13 | 11.33 | 23.58 | 00.08 | 12.33 | 07.48 | 20.13 | 06.48 | 19.13 | 09.48 | 22.13 | 10.48 | 23.13 | 09.18 | 21.43 | 10.33 | 22.58 |
| 25. nov | 10.23 | 22.47 | 09.23 | 21.47 | 09.38 | 22.02 | — | 12.23 | 00.58 | 13.23 | 08.38 | 21.02 | 07.38 | 20.02 | 10.38 | 23.02 | 11.38 | — | 10.08 | 22.32 | 11.23 | 23.47 |

5 707265 100050 >